## Búgvi um sonin Teit

- Tað var heilt fantastiskt at fáa hann. Tað gekk lang tíð, áðrenn tað gekk upp fyri mær, hvat var hent, tá ið Teitur varð føddur. Teitur er trý ár nú. Hann hevur verið við til judo. Eg ætli mær tó ikki at trýsta hann til nakað. Tað er als ikki vist, at tað er lukkan at gera so nógv ítrótt

## Búgvi um føðslu

- Mær dámar væl allan mat, og mær dámar eisini føroyskan mat. Mær dámar væl at eta. Eg hugsi ikki so nógv um, hvat eg eti, hóast eg burdi. Eg plagi at eta tað, sum eg fái at eta. Seyðarhøvd og fiskafrikadellur er eitt tað besta, sum eg fái



# eggur ár afturat lívinum



*- Tað renna nógv spilt talent á fótbóltsvøllinum, sum hava nýtt allan ungdómin uppá at sparka, men teir verða síðani soldaðir frá, tá ið teir gerast vaksnir. Teir høvdu verið fínir á einari judomáttu, sigur Búgvi Poulsen, sum heldur, at føroyingar skulu satsa uppá einstaklingaítróttargreinar*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Tað einu tíðina var hann úti mestsum allan dagin. Hann var til arbeiðis og fór síðani til Havnar at rógva. Hann var heima aftur umleið klokkan 22. Hann hevur nú róð tvey ár út í eitt. Hann plagar at byrja at rógva inni við maskinu tann 29. juli beint eftir, at kappróðurin er liðugur, sigur Marilyn og leggur afturat:

- Men eg plagi at senda hann út, um tað gongur eitt tíðarskeið, har ið hann ikki venur. Hann verður so ómøguligur at fáast við, um hann ikki venur, sigur Marilyn flennandi.

Búgvi viðgongur eisini, at hann er nærum bundin av at venja.

- Tað verður ein lívsstílur at venja. Tað er torført at gevast. Eg vænti ongantíð, at eg fari at gevast at íðka. Eg merki tó, at tað skal meira til fyri at halda meg í form, nú eg eri komin eitt sindur upp í árini, sigur hann.

- Tíðin, sum tú brúkar uppá at íðka, skal leggjast afturat samlaða livialdurinum, sigur Búgvi avgjørdur.

### Møguliga til OyL

Búgvi rør ikki í ár, tí at hann gongur í skúla í tekniska skúla í Havn, har ið hann lesur til byggiteknikara. Annars er eitt sindur óvist, hvussu verður hjá teimum eftir summarsteðgin.

- Eg eri byrjaður so smátt at venja judo aftur, og eg fari møguliga við til Oyggjaleikirnar á Rhodos í summar. Tað er alt eftir, um eg fái tíð ella ikki, sigur Búgvi.

Hann kennir heilt vist, at judo er "hansara", og hann er sera hugtikin av ítróttargreinini. Hann harmast bara um, at tað er so lítil áhugi fyri henni í Føroyum.

- Eg eri sera hugtikin av judo, og eg hyggi altíð at judo í sjónvarpinum, tá ið tað er at síggja. Tað er bara so syndarliga sjáldan. Judoítróttin broytir stíl við árunum, og tað er ótrúliga spennandi at fylgja við, um tú hevur eitt sindur skil fyri tí, sigur Búgvi.

### Judo er list

- Judo er so nógv tann flottasta ítróttargreinin av øllum kampítróttargreinum. Í judo skalt tú als ikki gera av við mótstøðumannin soleiðis, at hann fær ilt. Tú vinnur á honum og letur hann sleppa snikkaleysan, hóast tú hevur møguleikan at gera av við hann. Tað er virðiligt og tignarligt. Tað er um æru til vinnaran, og taparin verður onkursvegna eyðmýktur. Judo er list! Tað eru so ótrúliga nógvar fasettir í judo, og tað ger tað so fangandi, sigur Búgvi, sum heldur, at føroyingar skulu satsa uppá einstaklingaítróttargreinar heldur enn liðítróttargreinar.

- Tað renna nógv spilt talent á fótbóltsvøllunum, sum hava nýtt allan ungdómin uppá at sparka, og verða síðani soldaðir frá, tá ið teir gerast vaksnir. Teir høvdu verið fínir á einari judomáttu.

- Ein lítil tjóð skal satsa uppá einstaklingaítróttin, sum til dømis judo, um vit ætlað okkum upp á toppin, sigur Búgvi at enda.

## Fakta um
### Búgva

Føddur 26.04.1972
Er úr Havn
Unnustan eitur Marilyn Hansen
Sonurin eitur Teitur
Hevur íðkað judo síðani hann var 12 ár
Útlærdur timburmaður
Lesur til byggiteknikara
Hevur róð við Havnarbátinum
Rør inniróður